New Holland Grand Prix 2007:

# OK Heilsøla ynskir Birgiri tillukku



*Birgir Bærentsen hevur luttikið í New Holland Grand Prix 2007 við sera góðum úrsliti*



*Frá hátíðarhaldinum í Italia. Birgir Bærentsen er nummar fýra frá vinstru*

## Rætting

Av tí at tað síðsta av tekstinum manglaði, tá hendan greinum stóð á síðu 7 í innlegginum Bilar (Bilblaðið oktober 2007). Prenta vit tilfarið umaftur í dag. Vit biðja orsaka mistakið.

-red

**Føroyski maskinførarin Birgir Bærentsen hevur luttikið í »New Holland Grand Prix 2007«. Tað er italska traktor- og gravimaskinuverksmiðjan New Holland Construction sum skipar fyri heimsmeistaraskapi fyri maskinførarar**

Í hesum sambandi skipaði New Holland umboðið í Danmark, Bay Christensen A/S, fyri semifinaluni fyri maskinførarar í Norðurevropa í døgunum 27.- 28. september.

Kappast varð við hesum maskinum: New Holland W190B (17 tons gummiged, New Holland E215B (22 tons gravimaskina) og New Holland B115 (rennugravari).

Birgir Bærentsen, sum er maskinførari hjá J.K. Petersen, var við í semifinaluni og kappaðist ímóti 12 øðrum úr Norðurlondum. Hann bleiv nr. 3 og kom víðari til heimsmeistaraskapið í Italia sum var í døgunum 12. –13. oktober.

Av teimum tilsamans 42 finalistunum bleiv Birgir nr. 13, og Norðurevropeiski bólkurin hann var í, bleiv hann nr. 3. Ein týskari bleiv nummar eitt øllum finalistunum.

Italska verksmiðjan New Holland er ein av heimsins størstu framleiðarum av landbúnaðarog entreprenørmaskinum, sum verða seldar av 11.500 umboðum í 160 londum.

Í Føroyum er tað Sp/f O. K. Heilsøla í Hvalvík, sum umboðar New Holland Construction.

Fyritøkan ynskir Birgiri Bærentsen tillukku við sera góða úrslitinum.

sp/f O.K. HEILSØLA & MASKINUR
FO 430 Hvalvík • Tel. 422394




J.C. SVABOSGØTA 6 | FO-100 TÓRSHAVN | TLF 315 777 | FAX 315 772 | ERGO@ERGO.FO | WWW.ERGO.FO

Royn BioEnergiser

Sást tú Puk í »Ha'det godt« nr. 11 á DR1, har hon royndi BioEnergiser?

Royn tað sjálv/ur – nú bjóða vit Detox Spa viðgerð og selja karið.




ergo.fo

